LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 15. oktober 2014
J.Nr.: LUM-80- 14/00074-12
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**
viðvíkjandi klagu um vantandi innlit hjá Runavíkar kommunu

Við teldubrævi, dagfest 25. august 2014, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Vísandi til mína umbøn um skjalainnlit hjá Runavíkar kommunu, tann 1 august (*2014, mín viðmerking*).
>
> At nú eru meira enn 3 vikur síðan, eg bað um skjalainnlit, og einki svar er komið enn, um tað verður gingið á møti ella ikki.
>
> Tí kæri eg Runavíkar kommunu til Løgtingsins umboðsmann fyri viðgerðina av míni umbøn um skjalainnlit tann 1. august 2014."

**Málsgongd**
Í skjali, sum klagarin hevur sent Løgtingsins umboðsmanni sæst, at klagarin tann 1. august 2014 sendir Runavíkar kommunu soljóðandi teldubræv:

> "Eg ynski innlit í øll skjøl, sum Runavíkar kommuna hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í sambandi við virksemi hjá Runavíkar kommunu síðani 2005 við hædd á lendi, yvirflatuvatn, uttan um matr. X (A) og avløb frá matr. X og atkomumøguleikum við bilum."

Tann 14. august 2014 svarar Runavíkar kommunu klagaranum aftur við soljóðandi teldubrævi:

> "Sagt verður frá, at vit hava móttikið umbøn tygara um innlit.
>
> Málsviðgerin, sum skal svara umbønini um alment innlit, kemur aftur úr summarferiu í næstu viku, og verður umbønin um innlit avgreidd tá."

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 25. august 2014, varð klagan send Runavíkar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Tann 30. august 2014 sendir sonur klagarans, B, kunning til umboðsmannin við avriti av telduposti frá Runavíkar kommunu, sum í sambandi við innlitsmál klagarans spyr B eftir einum

ávísum telduposti frá honum, sum skuldi ligið í málinum, og sum Runavíkar kommuna ikki kann finna.

Tann 19. september 2014 sendir klagarin umboðsmanninum soljóðandi teldupost:

> “Umbøn um skjalainnlit hjá Runavíkar kommunu.
>
> Enn havi eg einki hoyrt aftur frá Runavíkar kommunu ella frá Løgtingsins umboðsmanni um mína umbøn um skjalainnlit tann 1. august 2014.”

Tann 29. september 2014 sendi umboðsmaðurin eina áminning til Runavíkar kommunu og bað Runavíkar kommunu um at lata umboðsmanninum umbidnu frágreiðingina beinanvegin.

Tann 8. oktober 2014 sendir Runavíkar kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> “**Viðv.: Klagu frá A**
>
> Vísandi til skriv tykkara, dagf. 25. august 2014, har biðið verður um innlit, fara vit at biðja orsaka, at svarið kemur so seint. Orsøkin er, at ein misskiljing er komin í, av tí at tvey mál, sum bæði snúgva seg um ognina matr. nr. X, vóru send LUM, har av annað varð koyrt víðari til Føroya Kærustovn og tí ikki skuldi svarast LUM.
>
> Vit vóru ikki varug við, at tað bara var annað málið, sum var sent víðari til Føroya Kærustovn og hava tí ikki svarað klaguni um innlit.
>
> Viðlagt er upprit frá Teknisku deild um málsgongdina, saman við avriti av skjølum, sum eru í málinum.
>
> Avrit av hesum er eisini sent A.”

**Niðurstøða**

Viðgerð mín av hesi klagu snýr seg um vantandi innlit í eitt byggimál hjá Runavíkar kommunu.

Tann 1. august 2014 bað A Runavíkar kommunu um innlit í eitt byggimál. Tann 2. august 2014 sendi B, vegna A, mær eina klagu um fyrisitingarligu handfaringina av sama byggimáli. Tann 25. august 2014 klagar A til mín um, at A ikki hevur fingið innlit í byggimálið. Tann 4. september 2014 boðaði eg Runavíkar kommunu frá, at eg, í samráð við B, havi sent klaguna um handfaringina av byggimálinum til Kærunevndina í lendismálum til viðgerðar.

Sum sæst í skrivinum frá Runavíkar kommunu, hevur kommunan misskilt støðuna og hevur í sambandi við skrivi frá mær tann 4. september 2014 lagt innlitsmálið til síðis. Hetta harmast Runavíkar kommuna um í skrivinum til mín, dagfest 8. oktober 2014. Av tí at hetta er ein feilur, sum myndugleikin harmast um, havi eg ongar viðmerkingar til tað, sum er farið fram í innlitsmálinum aftaná 4. september 2014.

Eg fari tó at viðmerkja tað, sum er farið fram í innlitsmálinum frá 1. august 2014, tá klagarin biður um innlit í byggimálið, og fram til 4. september 2014.

Í teldubrævi, dagfest 14. august 2014, boðar Runavíkar kommuna klagaranum frá, at málsviðgerin, sum skal svara umbønini um alment innlit, kemur aftur úr summarfrí komandi vikuna, og at umbønin um innlit verður avgreidd tá.

Eg haldi tað vera alt annað enn nøktandi, at ein borgari ikki kann fáa innlit í skjøl hjá Runavíkar kommunu, tí at eitt ávíst starvsfólk er í summarfrí.

Sambært § 16 í innlitslógini ( løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) og § 16 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) skal ein almennur myndugleiki sum skjótast gera av, um ein áheitan um innlit kann verða gingin á møti. Verður umbøn um innlit ikki gingin á møti innan 10 dagar, skal myndugleikin boða viðkomandi frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals. Harumframt skal ein myndugleiki, sambært góðum fyrisitingarsiði, svara einari áheitan í rímiligari tíð.

Tað er ein uppgáva hjá leiðsluni í kommununi at skipa arbeiðið soleiðis, at fyrisitingin virkar á fullgóðan hátt alt árið, sjálvt um starvsfólk halda frí í einum ávísum tíðarskeiði. Hóast tað kann vera torført hjá eini lítlari fyrisiting at vera fult virkin í t.d. summarfrítíðini, verður leiðslan í kommununi noydd at tryggja, at ein umbøn um innlit verður svarað innan fyri ta lógarásettu freistina, ella at umbønin verður avgreidd í rímiligari tíð.

Eg fari við hesum at heita á Runavíkar kommunu um at skipa soleiðis fyri, at ein umbøn um innlit í mál og skjøl hjá Runavíkar kommunu verður avgreidd alt árið innanfyri lógarásettu freistina, ella at umbønin verður avgreidd í rímiligari tíð.

Innlitsumbønin verður heldur ikki avgreidd í tíðarskeiðinum frá málsviðgerðin kemur aftur úr summarfrí og til 4. september 2014. Hetta er ikki nøktandi, og eg fari tí at geva Runavíkar kommunu eina átalu fyri hetta.

Runavíkar kommuna hevur í skrivi, dagfest 8. oktober 2014, boðað mær frá, at klagarin nú hevur fingið innlit í øll skjøl í byggimálinum. Burtursæð frá omanfyristandandi átalu og viðmerkingum, geri eg ikki meira við málið.

Vinarlig heilsan

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður